**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Avloysari fyri deildarergoterapeut

Ergoterapiin á Landssjúkrahúsinum søkir eftir avloysara fyri deildarergoterapeut á psykiatrisku deild á 37 tímar um vikuna. Starvið er frá 1.apríl 2005 til 31. mai 2006.

**Vit bjóða tær:**
Umframt fakligar og persónligar avbjóðingar kunnu vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í menning. Tú fær møguleika til at luttaka í okkara positiva og vælvirkandi toymi við nógvum fjøllbroyttum arbeiðsuppgávum.

**Um Ergoterapiina**
Ergoterapiin hevur tvey høvðusøkir, sum umfatað psykiatriska og somatiska viðgerð. Ergoterapiin hevur felags leiðara, sum hevur sína dagligu gongd á somatiska økinum.

Í ergoterapiini virka í løtuni 7 ergoterapeutar. 4 ergoterapeutar innan tað psykiatriska øki og 3 ergoterapeutar innan tað somatiska øki.

**Um arbeiði**
Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini, og ergoterapeutarnir hava ábyrgdina av hvør sínari deild. Vit nýta m.a eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag og arbeitt verður við dokumentatión.

**Arbeiðsøkið**
- Skal arbeiða undir leiðslu av leiðandi ergoterapeuti og skal vegna honum taka sær av dagligu leiðsluni á psykiatriska økinum.
- Skal luttaka í viðgerðini av brúkarunum.
- Skal halda seg kunnaðan við menningina innan ergoterapiina.
- Skal ráðgeva og vegleiða starvsfólkunum í ergoterapiini.

**Deildarergoterapeuturin**
Skal vera áhugaður í at luttaka í einari spennandi avbjóðing, kunna vísa áræði, ikki vera bangin fyri nýggjum tiltøkum og vera við til at útbyggja samstarv við aðrar fakbólkar. Vit leggja dent á persónligar eginleikar so sum »humor«, greiða talu og gott arbeiðslag.

Nærri fæst at vita um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a við at venda sær til Súnu Mørk, deildarergoterapeut tlf. 304500 lok. 5785, ella Kirstin Ellingsgaard, leiðandi ergoterapeut tlf. 304500 lok. 5781.

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Skrivlig umsókn** við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 28. februar 2005 kl. 12.00

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Útbúgving sum heilsuhjálpari!

*Er tað nakað fyri teg?*

**Hvør kann blíva heilsuhjálpari??**

Tá, ið hevur áhuga fyri at arbeiða við fólki og sum hevur 9. flokk + eitt ára arbeiðsroyndir, ella 10. flokk. Eisini um tú ikki hevur arbeitt sum heimahjálp fyrr!

Heilsuhjálparaútbúgvingin er ein sera breið útbúgving, har næmingarnir læra at síggja menniskjað sum eina heild, bæði fysiskt, sálarligt, sosialt og andaligt.

*Hesar 5 lærugreinir eru í útbúgvingini, við 20 % úr hvørjari:*

| Handaligur stuðul | Mentan og virksemi | Námsfrøði/ sálarfrøði | Almanna- og samfelagsfak | Røkt |
|---|---|---|---|---|
| Føðslulæra, húsarhald, reingerð, handilsørindi, matgerð, arbeiðsrørslur, flytihættir, persónligur stuðul, umsorgan, reinføri, úr- og ílating | Skapandi og handalig yrkisøki. Týdningin, ið eitt virkið og stimbrandi umhvørvi hevur, fyri lívsvirði hins einstaka | Manna- og næstrafólkakunnleiki, lívsfatanir- og royndir, lívssøgu, samskifti, samstarv, rættlag, menningarleið, ráðgeving og avlamislæru | Samfelagsviðurskifti, lívskor, lívshættir, arbeiðsumhvørvi, bygnað og uppgávur hjá almanna- og heilsuverkinum | Kropsbygnaður, lívvirkisfrøði, um heilsu, sjúkufyribyrging, eyðkenni og einfalda sjúkrarøkt. |

**Endamál við útbúgvingini:**
- at geva næmingunum førleika, so at teir kunnu stuðla fólki í at vera virkin í gerandisdegnum, so at tey í mestan mun kunnu liva sítt vanliga lív, umframt at veita einfalda sjúkrarøkt, við atliti at stuðli, røkt og umsorgan, har brúkarin býr

**Uppbygnaður:**
ítbúgvingin byrjar í septembur 2005 og er liðug síðst í august 2006. Umleið 1/3 av tíðini er teori og 2/3 eru starvsvenjing. Undirvísingin er uppbygd í evnir, er tvørfaklig og fyrigongur partvís í bólkum. Starvsvenjingin gongur fyri seg á ellisheimum, sambýlum og í heimarøktini.

Tú fær útbúgvingarstuðul undir útbúgvingini.

***Umsóknarfreistin er 15. marts 2005.***

Hevur tú hug at søkja, ella vil vita meira, so ring 372 855.

**Heilsuskúli Føroya**
Tvøroyri · www.skulin.fo/ahd - heilsuskuli@skulin.fo

# Jørð í Fuglafirði til sølu

Við hesum verður jørð í Gjógvaráhaga, matr. nr. 871a, og Norðuri í Haga, Heimari partur, matr. nr. 866, umframt tilhoyrandi innangarðsjørð, ávikavist matr. nr. 103a, 123a, 391a, 498a og 800a, øll Fuglafjørður, lýst til sølu.

Áhugað kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge, adv. ft.

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advokatfelagid@kallnet.fo

Tórmóður Djurhuus, adv. Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv. Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv. Ingi Højgaard, adv.



**Til sølu**
Hvítur Toyota Corolla 2,0 diesel
Árg. 11/2002
Bert koyrt 30.700 km

Norðoya LITBÚÐ
Tel. 457300 · Fartel. 755300

Lesið Sosialin - so eru tit við